Álit

í

løgtingsmáli nr. 94/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af søloven og úrgildisseting av lov om Rederes Forpligtelse til at meddele statistiske Oplysninger (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av málsøkinum sjóréttur o.a.)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 3. apríl 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Hetta uppskotið er ein avleiðing av lm-073/2023 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Ræðislógin) (Yvirtøka av málsøkinum sjóréttur).

Ætlanin er at yvirtaka málsøkið sjóréttur 29. juli 2025.

Tá ið málsøkið er yvirtikið, stendur verandi lóggáva á økinum við, sbrt. § 5 í yvirtøkulógini, sbr. § 13 í heimastýrislógini, men tær heimildir ella skyldur, sum liggja hjá donskum myndugleikum, verða við uppskotinum fluttar til avvarðandi føroyskar myndugleikar.

Tí er neyðugt at flyta donsku myndugleikaheimildirnar, sum eru nevndar í donsku lóggávuni, til føroyskar myndugleikar soleiðis, at har Søfartsstyrelsen var myndugleiki eftir donsku lóggávuni, verður tað Sjóvinnustýrið, sum verður myndugleiki aftaná yvirtøkuna.

Eisini verður ministeriella ábyrgdin flutt frá Erhvervs- og vækstministeren til føroyska landsstýrisfólkið, sum skal umsita økið.

Eisini verður lov nr. 75 af 29. marts 1904 om Rederes Forpligtelse til at meddele statistiske Oplysninger sett úr gildi. Talan er um lóggávu, sum er yvirtikin. Lógin snýr seg um skyldur reiðarans at lata inn hagtøl og um revsing fyri brot á hesa skyldu. Mett verður ikki, at lógin frá 1904 hevur nakran týdning longur, tí Hagstova Føroya umsitur í dag hesa uppgávu.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 10. apríl 2024

Erhard Joensen
formaður

Annika Olsen
næstforkvinna

Eyðdis Hartmann Niclasen

Jørgen Niclasen

Árni Skaale

Uni Holm Johannesen

Karlot Hergeirsson